# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Við lygnum dró Bush USA í kríggj við Irak, og hann skuldi verið settur fyri ein ríkisrætt afturfyri*
*(Donald Trump)*

# Obama vann eisini seinasta dystin

**Nú kann bara ein yvirgangsatsókn at USA forða Barrack Obama at vinna forsetavalið**



*John McCain var meiri ágangandi í nátt, men tað hjálpti ikki*
*(Mynd: AP)*

John McCain gjørdi í nátt eina roynd at vinna aftur eitt sindur av tí, sum hann hevur mist í seinastuni. Sambært teimum seinastu meiningakanningunum er hann langt aftan fyri Barrack Obama, nú bara tríggjar vikur eru til valið, og tí var sjónvarpsdysturin í nátt ein tann seinasti møguleikin hjá McCain at venda rákinum.

McCain var munandi meiri ágangandi í nátt enn í hinum báðum sjónvarpsdystunum. Spurningurin er so, um hann megnaði at sannføra aðrar veljarar enn sínar egnu, at teir eiga at atkvøða fyri honum. Eftir tí sum viðmerkjarar og kanningar søgdu aftan á orðaskiftið, eydnaðist tað ikki.

Ein kanning, sum sjónvarpið CNN gjørdi beint aftan á sendingina, vísti, at 58 prosent av veljarunum hildu, at Obama hevði vunnið dystin, meðan 31 prosent hildu, at McCain hevði staðið seg betur.

### Ov seint

McCain var týðiliga til dystin fús, tá sendingin byrjaði, og hann var munandi meiri ágangandi í sínum orðavali. Men eygleiðarar siga, at tað eydnaðist honum kortini ikki at taka Obama av fótum. Teir vísa á, at Obama svaraði sakliga og brosandi, meðan McCain tóktist hava ilt við at halda sínum sinni niðri. Hann flenti fleiri ferðir niðurlátandi og vísti, hvat hann helt um sín mótstøðumann, hóast júst hesin verumáti hansara vísti seg at vera hansara veikleiki í teimum báðum fyrru sjónvarpsdystunum, skrivar NTB.

Amerikanskir fjølmiðlar søgdu í morgun, at John McCain hevði ov lítið at bera fram í orðaskiftinum í nátt, og at tað, sum hann hevði, kom ov seint.

- Nú kann bara ein yvirgangsatsókn at USA forða Barrack Obama at vinna forsetavalið, segði ein av viðmerkjarunum.



*Nú kann bara ein vanlukka forða Obama at vinna valið*
*(Mynd: AP)*

# Drápsroynd ímóti Jóhannesi Páll páva hildin loynilig

**Ein spanskur prestur royndi at beina fyri Jóhannesi Páll páva í 1982**

Allur heimurin sá, tá tann víðgongdi høgramaðurin Mehmet Ali Agca royndi at beina fyri Jóhannesi Páll páva tann 13. mai í 1981. Men tá eru tey fáu, sum vita, at pávin eisini var fyri drápsroynd eitt ár seinni.

Í einum nýggjum filmi kemur fram, at tá pávin var í Portugal í mei í 1982, royndi ein spanskur prestur at beina fyri honum. Higartil hevur verið hildið, at portugisiska løgreglan steðgaði prestinum, áðrenn hann slapp fram at pávanum, men í filminum sæst, at pávin bleiv stungin ella skorin.

Fimurin Testimony er gjørdur eftir endurminningum hjá kardinalinum Stanislaw Dziwisz, sum var ráðgevi hjá táverandi pávanum.



*Stanislaw Dziwisz, kardinalur og Jóhannes Páll pávi*
*(Mynd: AP)*

# Omar versnar í hvørjum

**Tropiska ódnin Omar versnar í hvørjum, nú hon nærkast oyggjunum í Karibiska havinum**

Í gjárkvøldið boðaði amerikanski veðurstovnurin frá, at Omar var versnað so mikið nógv, at hon var vorðin ein tropisk ódn á triðja stigi. Tá var ódnin stutt eystan fyri St. Croix á Jomfrúoyggjunum, og vindferðin var farin upp um 51 metrar um sekundið.

Myndugleikarnir á Jomfrúoyggjunum og á nøkrum smáum oyggjum eystan fyri Puerto Rico hava sent út almenna ávaring, og veðurmenninir vænta, at Omar fer eisini at herja oyggjarnar St. Martin og St. Kitts og Bretsku Jomfrúoyggjarnar.

Í dag eru allir skúlar stongdir í Puerto Rico, og øll skip hava fingið boð um at koma í havn.

## STUTT SAGT

### Skal avrættast fyri jól



*Roberti Saviano, rithøvundur og tíðindamaður*
*(Mynd: AP)*

Í Italia hevur ein fyrrverandi limur í Mafiuni greitt løgregluni frá, at Mafian í Napoli ætlar at beina fyri rithøvundinum og tíðindamanninum Roberti Saviano í næstum.

Saviano hevur skrivað bókina »Comorra«, sum er um tann kriminella undirheimin í stórbýnum Napoli. Bókin kom út í 2006, og síðani hevur Saviano livað við løgregluverju hvønn dag.

Franco Roberti, sum arbeiðir hjá ákæruvaldinum í Napoli, sigur við tíðindastovuna AP, at ákæruvaldið kannar, um hald er í tí, sum tann fyrrverandi mafialimurin hevur sagt. Sambært Roberti er málið serliga álvarssamt, tí sambært tí, sum løgreglan hevur fingið at vita, umfatar drápsætlanin ímóti Saviano eisini tey løgreglufólkini, sum ansa eftir honum. Sambært manninum, sum hevur vent sær til løgregluna, skal Saviano beinast av vegnum fyri jól í ár.

Bókin »Comorra« lýsir, hvussu Comorra-mafian hevur tamarhald á øllum tí kriminella undirheiminum í Napoli, og at hon eisini hevur eftirlit við rusksavningini í býnum. Bókin er gjørd til film, og á filmstevnuni í Cannes í vár vann filmurin aðru virðisløn. Harafturat er filmurin við í Oscar-kappingini næsta ár sum besti útlendfski filmurin, skrivar AP.

### Nancy Reagan innløgd

Nancy Reagan, einkjan eftir fyrrverandi amerikanska forsetan Ronalds Reagan, varð flutt á sjúkrahús í gjár.

Sagt verður, at Nancy Reagan var dottin heima við hús. Hon hevði kært seg um pínu, og lækni hennara gjørdi av at koyra hana á sjúkrahús at kanna, um hon hevði brákað ella kanska brotið mjødnina.

Nancy Reagan er 87 ára gomul.